Heidi fekk hetju-móttøku

Heidi fekk blómur og gávur, tá hon kom heim aftur av glæsiligu útfer› síni hinumegin knøttin

Mynd: Edvard Joensen

Sum ta› sømdi seg einum røttum olympiskum vinnara, fekk Heidi Andreasen eina móttøku, sum var eini drotning verdug, tá hon kom heim aftur til Ei›is hóskvøldi›

MÓTTØKA

Edvard Joensen

Ei›i: Á Ei›i fór ma›ur av húsi hóskvøldi›, tá Heidi Andreasen kom heim aftur vi› f‡ra olympiskum hei›ursmerkjum. Heidi fekk eina móttøku, sum var eini drotning verdug.

Regni› síla›i spakuliga ni›ur í stillinum hóskvøldi›. Ta› gekk ein rúgva av børnum á Vaglinum. Summi høvdu bannarar, og onnur høvdu kyndlar. Tey gjørdu klárt til móttøkuna, sum ver›a skuldi, tá kendi javnaldri teirra, Heidi Andreasen, koma aftur til heimbygdina eftir at hava gjørt øllum landinum æru hinumegin Jar›arknøttin.

Fleiri fólk komu aftrat. Bilarnir vór›u settir ymsasta›ni longri burtur frá. Fløgg og sangir vór›u b‡tt út. Har stø›u børn og ommur, vaksnir menn og gamlir abbar vi› sangbla›i› og flaggi.

Børnini fingu øll kyndlar, og summi festu í beinanveg, hóast ta› enn var umlei› eitt korter, til bilurin vi› Heidi var væntandi.

Nú fartelefon er í hvørjum lumma, er einki fyri at halda seg kunna›anum um, hvar hvør er staddur.

So sleit í. Ta› tóktiskt, sum vildi tann, sum vi› kranan situr, ikki hava sitandi á sær, at hann skuldi oy›ileggja hesa fagna›arløtuna vi› regni, nú olympisk hei›ursmerki á fyrsta sinni komu til Ei›is.

Stákast var› inni í húsunum, sum Ei›is Kommuna eigur, og har slík tiltøk plaga at ver›a fyrireika›. Fólk frá bygdarrá›num, frá Ei›is Bóltfelag og onkur granni hjá familjuni hjá Heidi sóust tita kvikliga upp og ni›ur trappurnar, Summi vi› leidningum, sum settir vór›u til mikrofon og hátalarar, onkur vi› blómum og ø›rum gávum, og so onkur, sum bara sá út til at hava nógv um at vera. Alt skuldi skipast upp á besta máta.

Ta› kemur alt meira fólk. Vagli› fyllist, og fólk eru farin upp á trappur og a›rasta›ni, har úts‡ni› er best, fyri at fylgja sum frægast vi›, tá hendan stórhending í bygdarsøguni skuldi fara fram.

Hugt ver›ur yvir á kirkjutorni› at vita, hvussu nógv klokkan nú er vor›in. Hon gongur seint eina sovor›na løtu. Kyndlarnir hjá summum børnum eru farnir at styttast, so rá›iligast ver›ur hildi› at sløkkja teir, so teir ikki vera ni›urbrendir, á›renn hei›ursgesturin kemur.

So sæst ein bilur koma sunnaneftir. Øll vistu, at Heidi hev›i veri› til móttøku í Havn, á›renn hon kom heimaftur, so ta› er sunnaneftir, hon skal koma.

Bilurin kemur sakuliga glí›andi heim eftir Kirkjuvegnum og ste›gar. Jú, fólk kenna bilin hjá pápanum, so har er eingin ivi, nú er hon her.

Fólk tyrpast saman um bilin. Heidi situr aftan fyri. Hon hyggur uttan um seg og sær ógvuliga ovfarin út, tá hon stígur úr bilinum.

– Jú, sigur pápin. Vit vistu, at okkurt skuldi ver›a, men at ta› skuldi vera so stórfingi›, høvdu vit ikki rokna› vi›.

Og hann hvørvur í fólkamongdini, sum tro›kast saman um tey fyri at sleppa at ynskja tillukku vi› hesum frágera bragdi›, hendan unga gentan hevur gjørt.

Sum vera man ver›ur stilla› upp til myndatøku. Omman og abbin á Ei›i eru, sum rímiligt er, mitt í rúgvuni. Ikki er sørt, at sinnismunur sæst aftur í onkrum andliti. Og skulu tey ikki vera eitt sindur rørd eina slíka løtu, ver›ur ringt at finna løtuna, sum hóskar betri. Ta› ver›ur kroyst og klemma› og onkur hevur hug at fella eitt tár eisini.

Vinkonur, javnaldrar, skúlafelagar, lærarar, ommur, konur, menn og øll hini. Øll vilja sleppa fram at at ynskja tillukku. Øll meina ta› av innasta hjarta, og Heidi og øll familjan hevur ta› so hjartaliga uppibori›.

Sjónligt er, at Heidi er mó› eftir drúgvu fer›ina heimaftur. Men hon ber seg manniliga. Er gla› og tekur blídliga í móti øllum, sum koma at heilsa henni.

Og so eru ta› rø›urnar. Har eru fólk frá bygdarrá›num og frá ítróttarfelagnum, sum vilja siga nøkur or› og handa gávur. Umbo› fyri mentanardeildina og bygdarrá›sforma›urin halda rø›u. Og at enda fer pápin upp á rø›arapallin og takkar hjartaliga fyri ta stórfingnu móttøku, tey hava fingi›.

Ta› er stilli, og púra íslit-i›. Kyndlarnir eru farnir at styttast, og eitt sindur er fari› at tynnast í mannamúgvuni. Heidi stendur gla› og væl nøgd mitt í rúgvuni av vinkonum, sum ikki vilja sleppa henni. Eina løtu, beint tá hon kom úr bilinum, var hon sjónliga ávirka› av mø›i, sum ikki kann vera so løgi›. Túrurin úr Sydney til Ei›is er ikki naka›, sum ein bara ger, uttan at ta› merkist. Men skúlastjórin hev›i lova› henni, at hon fær frí í morgin, skiltist.

Men nú er alt líkasum gloymt. Nú er hon aftur á kendum lei›um. Vi› f‡ra olympiskum hei›ursmerkjum, sum hon hevur vunni› á útfer›, har hon hevur sett Føroyar á heimskorti› og brent tilvitanina um hendan lítla oyggjaflokkin inn í høvdi› á teimum »down under«.

Sanniliga hevur Heidi Andresen uppliva› bæ›i, at her gjørdist.......... heimfer›in blí› og bjørt, og Føroyum hevur hon hepni gjørt.

Heidi var› móttikin av ei›isbørnum vi› kyndlum og sangi

Mynd: Edvard Joensen

Omman og abbin høvdu gó›a grund til at vera errin

Mynd: Edvard Joensen

Vikuskifti

Nr. 213 • leygardagur • 4. november 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Listin bókførd



So kom hon, ársins bók »Myndlist í Føroyum«

sí›a 20-21

- Ta› liggur eitt øgiligt potentiali úti í fólkinum, sum ikki sæst á nakrari fíggjarlóg

Mail um mentan

MENTAMÁLARÀ‹HARRIN Hev›i eg ikki hvat áhuga fyri mentanini, fyri samfelagsmálum í síni heild og havt hetta brennandi ynski um at koma at búleikast í føroysku republikkini um fá ár - nú sær ta› út til, at ta› fara at ganga eini 5-6 ár - ja, so sat eg ikki her ídag

Birgir Kruse

Í práti her í bla›num leygardagin 28.10. sigur Carl Johan Jensen rithøvundur, at Føroyar eru einasta landi› í heiminum, sum ikki letur naka› nevnivert til listafólk. Hvat sigur mentamálará›harrin - í stuttum og uppá standandi fót - til ta›?

Gott kvøld Birgir, hetta er ein gó›ur háttur at samskifta. Gjørdist eitt sindur skakkur av samrø›uni, sum bla›i› hev›i vi› Carl Jóhan. Hev›i hann havt veri› fluga á landsst‡risfundunum og har sæ› hvussu nógv knoglafeitt var› n‡tt í strembanini fyri øktari játtan til mentamál, tá hev›i hann kanska ikki veri› so gr‡skur vi› landsst‡rismannin. Men or›i› er frítt, ta› skal ta› ver›a, - og landsst‡risma›urin hevur tjúkka hvølju. Samstundis sum mentamál hava fingi› eina øking í játtanini uppá 10% í næsta ári, so skal eg vera tann fyrsti at ásanna, at her er langt eftir á mál. Ra›festingin av mentanini hevur sjáldan ligi› frammalaga og hevur kanska eisini li›i› undir tí, at hon hevur ligi› undir landsst‡rismanninum í undirvísingarmálum. Ta› hevur veri› lættari at rokna út hvat i› skúlin kosta›i, og tá i› hann hev›i fingi› sítt, tá var› sjaldan naka› eftir til hin partin.

Politiskt hevur man annars sett út í korti›, at játtanin til mentanina skal hækka vi› 10% um ári› tey næstu 10 árini, og tá roknar man vi› at liggja á-javnt vi› hini nor›urlondini.

Sum er sleppa partar av fólki okkara undan at rinda fullan skatt, eg hugsi um sjómenn og tey tiltiknu 15 prosentini; hvat heldur mentamálará›harrin um, at rithøvundar, i› forvinna líti› - eini hálvtanna›hundra› túsund ella væl minni, heilt ella lutvíst sleppa undan skatti? Ella er ta› í heila taki rætt at sleppa nøkrum samfelagsborgara undan fullari skattskyldu í okkara samfelag?

Havi ongantí› skilt, hví skattavi›urskiftini skula ver›a ymisk fyri teir ymisku samfelagsbólkarnar. Ta› fyrikemur mær undarligt at gera mun á fólki á hendan hátt. Arbei›smarkna›urin er jú frælsur, ein og hvør kennir fyritreytirnar, á›renn hann velur sær eitt starv. So í prinsippinum haldi eg, at øll skula vera undir somu meginreglu, tó vi› tí progressiviteti sum er innlagdur í skattaskipanina, vit hava ídag, har i› tær sterkastu her›arnar bera tær tyngstu byr›arnar. Annars haldi eg at vit eiga at halda fast vi› 50% marki›, solei›is at ta› altí› loysir seg at vinna sum mest.

Sagt ver›ur í á›urnevndu grein, at politikarar megna ikki at hugsa í heildum, sum mentunarliga øki› er, men hugsa bert í støkum áhugamálum, sum eitt nú flakvirkjum og líknandi. Er hetta ein orsøk til eina møguliga "illvild" móti mentan, ella í minsta lagi eina - at síggja til - líkasælu, mentanini vi›víkjandi? Er mentanin ov vánaligt agn fyri at ver›a í sjómannamáli?

Ja, nú er mentan eitt ví›fevnt hugtak. So spurningurin er torførur at svara. Ta› liggur eitt øgiligt potentiali úti í fólkinum, sum ikki sæst á nakrari fíggjarlóg. Hugsa um allar eldsálirnar, idealistarnar og filantroparnar úti á bygdum og b‡um, sum brúka hvørja fríløtu í felagstøkum. Hetta kann ikki yvirmetast. Hetta er salti›. Fundamenti›. Caragata rokna›i seg fram til, at vit brendu gó›ar 13 milliardir av í hesum famøsu árunum, sum liggja so evarska stutt aftan fyri okkum.

Hugsa tær til, hvat i› bara ein lítil partur av hesum peningi hev›i kunna veri› n‡ttur til á eitt nú mentunarøkinum. Tjó›leikhús, lærdur háskúli, listaskúli, skjalasavn, náttúrugripasavn, føroyskt sjónvarp, or›abøkur, mentunarhús úti á bygdunum o.s.fr.

Ta› er kanska naka› av rætti í spurninginum. Fíggjarlógirnar vóru jú solei›is samanskrúva›ar, at tá i› stu›ulin til fiskivinnuna, almanna- & heilsuverki og skúlaverki› høvdu fingi› sítt, tá var sjaldan naka› eftir at b‡ta, - til eitt nú mentanina. Og agn er onki í hesum. Hev›i eg ikki havt áhuga fyri mentanini, fyri samfelagsmálum í síni heild og havt hetta brennandi ynski um at koma at búleikast í føroysku republikkini um fá ár, nú sær ta› út til, at ta› fara at ganga eini 5-6 ár, ja, so sat eg ikki her ídag. Havi ikki forvunni› so líti› av peningi tey seinastu 20 árini, so hetta kann hvørki brúkast sum persónligt ella politiskt agn. Mentanin hevur havt alt ov lítlan áhuga, ta› sær tú best tá i› mentunarvi›urskifti eru til vi›ger›ar í tinginum, sjaldan eru ta› fleiri enn framsøgumenninir, i› stø›ast í salinum, tá i› mál av hesum slagi eru frammi.

Fyri mær er mentunarspurningurin óloysiliga tengdur at tjó›skaparspurninginum. Hvat skal tú brúka eina skralltóma republikk til?

Greinin endar á sí›u 25